# Vágur ein ørgrynna av náttúru

Vágar er við sínum umleið 178 ferkilometrum, triðstørsta oyggj í Føroyum, og har búgva á leið 3.000 fólk. Vágar hevur vegasamband við meginøkið gjøgnum Vágatunnilin, sum var fyrsti undirsjóvartunnil í Føroyum. Sambandið út í heim er eisini úr Vágum, har einasti flogvøllur í Føroyum liggur. Vágar eru eyðkendar við stóru vøtnunum Leitisvatni/Sørvágsvatni og Fjallavatni umframt smærri vøtnum, har væl liggur fyri at fiska. Hetta er størsta óbygda øki í Vágum. Øll strondin norðanfyri, frá Gásadali í vestri til Sandavágs í eystri, liggur sum ein stór náttúrupark og gevur ríkar møguleikar fyri upplivingum. Størsti hólmarnir í landinum liggja vestanfyri, Tindhólmur og Mykineshólmur. Gistingartilboð í oynni eru hotel vallaraheim, camping, ból & biti og summarhús. Møguleiki er sjálvandi eisini at eta á matstovu og cafeteria. Mykines er við sínum á leið 11 ferkilometrum, eyðkend við sínum ríka fuglalívi. Har heldur súlan til saman við ørgrynnu av lunda og øðrum fugli. Oyggin er fevnd av lívi og ljóði allan sólarringin.






















